BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

# Landsroyndin 2024

## Frágreiðing

Juni 2024

## Innihaldsyvirlit


Frágreiðing um landsroyndirnar í fólkaskúlanum 2024 .... 3

Royndarúrslitini 2024 .... 5

Føroyskt .... 5

Lesifatan 4. flokkur .... 5

Staviførleiki 4. flokkur .... 6

Lesifatan 6. flokkur .... 7

Staviførleiki 6. flokkur .... 8

Málførleiki 6. flokkur .... 9

Náttúra og tøkni 4. flokkur .... 10

Náttúra og tøkni 6. flokkur .... 11

Støddfrøði 4. flokkur .... 13

Støddfrøði 6. flokkur .... 14

Samanumtøka .... 15

# Frágreiðing um landsroyndirnar í fólkaskúlanum 2024

Landsroyndirnar verða skipaðar sambært løgtingslóg § 14, stk. 4 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan. Ásett er, at landsstýrismaðurin kunnger miðalúrslitið fyri landið og almannakunnger samstundis frágreiðing um royndarúrslitið.  Einstøku skúlarnir fáa úrslitini hjá sínum næmingum, og foreldur og næmingar verða kunnað um úrslitini. Tað áliggur skúlaleiðaranum at viðgera úrslitini frá landsroyndini saman við einstøku lærarunum og leggja eina ætlan fyri, hvussu neyðugar ábøtur skulu fremjast, umframt at senda myndugleikunum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir úrslitini í landsroyndini hava elvt til.

Endamálið við landsroyndunum er at meta um førleikan hjá næmingum fólkaskúlans í ávísum lærugreinum, og landsroyndirnar geva skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í úrtøkuna hjá næmingum í 4. og 6. flokki í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni.

Lærarar, sum undirvísa í royndarlærugreinunum, fáa innlit í úrslitini hjá næmingunum í ávísu lærugreinini og skulu nýta hesi í sambandi við arbeiðið at menna undirvísingina hjá einstaka næminginum og flokkinum. Landsroyndarúrslitið vísir ikki heildarúrtøkuna hjá næmingunum og skal tí ikki standa einsamalt, men skal skiljast sum eitt ískoyti til regluligu eftirmetingina hjá skúlanum av úrtøkuni hjá hvørjum einstøkum næmingi í dagligu undirvísingini í avvarðandi lærugrein.

Landsroyndaruppgávurnar eru gjørdar við støði í ávegismálunum fyri 4. og 6. floksstig í einstøku lærugreinunum. Uppgávurnar eru gjørdar av uppgávunevndum, ið eru mannaðar við lærarum, sum hava drúgvar royndir at undirvísa í lærugreinunum og gott innlit í fakliga støðið og innihaldið í lærugreinunum. Harumframt hava námsráðgevarnir í føroyskum, støddfrøði og náttúru og tøkni verið knýttir at uppgávutilgongdini fyri at vegleiða og meta um innihald og støði í mun til fortreytir og væntan av, hvat næmingar í 4. og 6. árgangi eiga at duga í mun til ávegismálini í námsætlanunum.

Uppgávurnar eru talgildar og eru gjørdar í og til WISEflow-skipanina. Støðið er tikið í námsætlanunum, og miðað hevur verið eftir at leggja tal av uppgávum, fjølbroytni í evnum og torleikastøði soleiðis, at allir næmingar hava nokk av uppgávum at loysa innan ásetta tíðarkarmin.

Seinastu árini hevur verið arbeitt við at menna ein hugtakskarm, og hesin er nýttur í uppgávunum. Tað vil siga, at yvirskipað fevna uppgávurnar um førleikarnar:

1) at finna upplýsing / einføld roknistykki
2) at fata / fleiri roknitilgongdir; t.d. at lesa grafar
3) at hugleiða

Frágreiðing um hugtakskarmin er í landsroyndarfrágreiðingini frá 2022, sum liggur á heimasíðuni hjá Próvstovuni Landsroyndarfragreidingin_2022.pdf (provstovan.fo)

Í august 2023 varð nýggj námsætlan fyri náttúru og tøkni sett í gildi. Uppgávurnar til náttúru og tøkni, 4. flokkur, eru gjørdar eftir nýggju námsætlanini, meðan uppgávurnar til 6. flokk eru gjørdar eftir gomlu námsætlanini.

Í ár er fjúrtanda ferð, at landsroynd er hildin. Umleið 1300 næmingar á 35 skúlum luttóku í landsroyndunum, sum vóru skipaðar í døgunum 16., 17., 18. og 19. apríl. Eftir ynski frá skúlum varð royndin hesaferð skipað yvir 4 dagar fyri at geva rúm fyri, at næmingarnir kunnu hugsavna seg um eina roynd um dagin. Eisini gevur hetta ró hjá næmingum, ið hava tørv á eyka tíð. Av tekniskum orsøkum luttóku næmingarnir á einum skúla ikki í royndini í støddfrøði saman við hinum, men fóru til royndina seinni. Úrslitini hjá teimum eru sostatt ikki við í hesum miðaltølunum.

## Royndarúrslitini 2024

## Føroyskt

Royndin í føroyskum er býtt í tveir og tríggjar partar.

4. flokkur: Lesifatan og staviførleiki

6. flokkur: Lesifatan, staviførleiki og málførleiki

### Lesifatan 4. flokkur

Uppgávan er sett saman av 9 pørtum, sum umfata stuttsøgu, sang, yrkistekst, faktatekst og margháttaðan tekst.

Fleiri spurningar eru knýttir at hvørjum parti, og til samans eru 28 spurningar at svara.

649 næmingar luttøku í hesi roynd.

Miðalúrslit fyri landið er 64,9%




*Talva 1. Føroyskt lesifatan, 4. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Talva 1 vísir, hvussu næmingarnir hava klárað seg í ymsu uppgávunum. Sum heild hava næmingarnir klárað betur fyrra part av royndini. At næmingarnir loysa hesar uppgávurnar væl er í tráð við endamálið um, at allir næmingar fáa kensluna av, at tey megna nakrar uppgávur.

Tað eru serliga tvey úrslit, ið skara burturúr. Hetta er nr. 6:1 við 28% og 9:3 við 34%.

Uppgáva 6:1 snýr seg um rím. Næmingarnir skulu velja ímillum trý svar um, hvørjar reglur í einum sangi bera upp á rím.

Allur 9. partur er eitt nýtt uppgávuslag. Tey skulu lesa ymisk skelti við teksti. Sum sæst í talvu 1, so er tað bert tann eini spurningurin, ið skarar burturúr. Í 9:3 er miðalúrslitið 28%. Í hesum spurninginum er neyðugt at steðga á og nærlesa fyri at finna svarið.

## Staviførleiki 4. flokkur

Uppgávan er í 4 pørtum. Í fyrsta parti skulu næmingarnir skriva tveir leysar setningar, ið eru 35 orð tilsamans. Í hinum trimum pørtunum er talan um innsetingaruppgávur, ein samanhangandi tekstur.

650 næmingar luttøku í hesi roynd.

<u>Miðalúrslit fyri landið er 64,69%</u>



*Talva 2. Føroyskt staviførleiki 4. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Miðalúrslitið fyri teir ymisku partarnar sær soleiðis út: 1. partur (68,2%), 2. partur (68%), 3. partur (60%) og 4. partur (63,5%). Sambært talvu 2 hava næmingarnir havt truplast við 3. parti.

Tað er hugaligt at síggja, at næmingarnir klára seg væl, tá tey skulu skriva øll orðini. Hesin táttur, var fyrstu ferð royndur í WISEflow í 2021, og ynskiligt er at halda fram við hesum.

3. partur er lakastur, í hesum partinum skulu næmingarnir rættiliga halda skil á mállæruni. Her skulu næmingarnir m.a. duga dupult hjáljóð, bundin navnorð, og nær vit skriva a ella æ.

## Lesifatan 6. flokkur

Uppgávan er sett saman av 10 pørtum, sum umfata stuttsøgu, yrkingar, yrkistekst, faktatekst, margháttaðan tekst og fagurfrøði.

Fleiri spurningar eru knýttir at hvørjum parti. Til samans eru 25 spurningar.

619 næmingar luttøku í hesi roynd.

<u>Miðalúrslit fyri landið er 56,45%</u>




*Talva 3. Føroyskt lesifatan, 6. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Talva 3 vísir, at miðalúrslitini fyri tær ymisku uppgávurnar í lesiførleika fyri 6. flokk eru rættiliga misjøvn. Tær uppgávurnar, sum næmingarnir í miðal hava klárað seg best í, hoyra til í 1. part.

Hesar uppgávur hoyra til stuttsøguna. At næmingarnir loysa hesar uppgávurnar væl er í tráð við endamálið um, at allir næmingar fáa kensluna av, at tey megna nakrar uppgávur.

Ein uppgáva, sum fellur í eyguni, er uppgáva 10:3 (17,3%). Uppgávurnar í 10. parti eru eitt nýtt slag av uppgávum í mun til undanfarin ár. Her skulu næmingar lesa skelti og svara spurningum, og hetta krevur neyvlesing.

## Staviførleiki 6. flokkur

Eins og galdandi er fyri staviførleikan til 4. flokk, er staviførleikin til 6. flokk býttur í 4 partar. Seinasti partur er einstakir setningar, har øll orðini skulu skrivast, 34 í tali. Hinir tríggir partarnir eru brot úr longri teksti, og er hetta innsetingaruppgáva.

618 næmingar vóru til hesa roynd.

<u>Miðalúrslit fyri landið er 73%</u>




*Talva 4. Føroyskt staviførleiki 6. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Miðalúrslitið fyri teir ymisku partarnar sær soleiðis út: 1. partur (71,8%), 2. partur (76,97%), 3. partur (71,6%) og 4. partur (72,2%). Talva 4 vísir, at næmingarnir í miðal hava loyst teir ymsu partarnar rættiliga javnt. 2. partur er tó tann parturin, tey hava loyst best í miðal.

2. partur skilir seg frá við, at har er beinleiðis tala og ikki eins tættur tekstur og í hinum pørtunum.

## Málførleiki 6. flokkur

Í uppgávuni um málførleika eru níggju partar. Talan er um ymiskar mállæruuppgávur, sum t.d. at velja røttu endingina, benda orð rætt, velja orðaflokk og seta komma.

618 næmingar vóru til hesa roynd.

<u>Miðalúrslit fyri landið er 64%</u>




*Talva 5. Føroyskt málførleiki 6. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Talva 5 vísir miðalúrslitið fyri teir ymisku partarnar. Parturin, sum í miðal hevur volt næmingunum størsta avbjóðing, er 3. partur, sum snýr seg um at gera ein setning við ymiskum setningsliðum. Í hesum partinum skulu næmingarnir halda skil á heitunum í setningsgreining, umframt á orðaflokkum og bendingarmynstrum. Tað er ein torfør uppgáva.

## Náttúra og tøkni 4. flokkur

Uppgávurnar í náttúru og tøkni eru bólkaðar í fýra partar, sum snúgva seg um evnini “Jørðin og lívið á jørðini”, “Kroppur og heilsa”, “Orka og tilfar” og “Ymiskt um Føroyar”.

Í alt eru 19 partar. Fleiri spurningar eru knýttir at hvørjum parti.

659 næmingar vóru til hesa roynd.

Miðalúrslit fyri landið er 70,8%




*Talva 6. Náttúra og tøkni 4. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Úrslitið hjá 4. flokki hevur sera fá sveiggj. Tað eru 2 spurningar, ið fella millum hinar, teir eru 4. partur (45,8%), ið snýr seg um forritan, sum er nýggj uppgáva í náttúru og tøkni, og 19. partur (18,7%), ið snýr seg um evnafrøði, sum hevur verið ein partur av royndini síðan 2022, og sum er partur av førleikamálunum í 4. flokki.

Nýggj námsætlan er fyri 4. flokk við greiðum fakligum førleikamálum. Hetta ger uppgávuarbeiði, ið annars hevur verið torført, léttari og meiri miðvíst, samstundis sum bæði næmingar og lærarar vita, hvat tey skulu fyrihalda seg til.

## Náttúra og tøkni 6. flokkur

Næmingar, sum ganga í 6. flokki í skúlaárinum 2023-24, fylgja gomlu námsætlanini fyri náttúru og tøkni. Landsroyndaruppgávurnar til náttúru og tøkni, 6. flokkur, eru tí gjørdar eftir gomlu námsætlanini, sum bert hevur faklig førleikamál fyri 6. flokk. Hetta merkir, at førleikamálini eru mong í tali, tí 4. og 5. flokkur eru partur av hesum málum.

Uppgávurnar eru settar saman av fýra høvuðspørtum: "Heimstaðurin", "Heimurin uttan um okkum", "Samspæl menniskjunnar við náttúruna" og "Náttúra og tøkni".

Í alt eru 26 partar. Fleiri spurningar eru knýttir at hvørjum parti.

621 næmingar vóru til hesa roynd.

<u>Miðalúrslit fyri landið er 63,19%</u>




*Talva 7. Náttúra og tøkni 6. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Sambært talvu 7 gevur miðalúrslitið fyri teir ymsu partarnar eina ábending um, at nógvir næmingar hava havt avbjóðingar við at loysa ein stóran part av uppgávunum. Okkara mál, at

uppgávurnar skulu hava eina stigvísa hækkan frá byrjan til enda, er ikki nátt, og mugu vit hyggja nærri at, hví so er.

Uppgávurnar, ið hava verið serliga truplar hjá næmingunum koma longu í 3. (32,8%) og 4. parti (33,82). Hesar báðar uppgávurnar snúgva seg um tara. 7. partur (42,59%) snýr seg um jarðfeingi, og 21. partur (41,55%) snýr seg broytingar í Atlantshavinum. Her skulu tey fyrihalda seg til bæði farmynd og útsøgn.

6. flokkur klárar seg í miðal verri enn 4. flokkur. Tað verður áhugavert at fylgja, hvussu fer at gangast 6. flokki, tá tey eisini fylgja nýggju námsætlanini. Hetta verður tó ikki fyrr enn til landsroyndina í 2026.

## Støddfrøði 4. flokkur

Uppgávurnar í støddfrøði til 4. flokk eru samansettar av 22 pørtum. Fleiri spurningar eru knýttir at hvørjum parti. Talan er um pluss, minus, lesistykkir, at býta, hagfrøði o.a. Alt roknihættir, sum eru ítøkiliga nevndir í námsætlanini undir “Fakligir førleikar, 4. flokkur”.

615 næmingar vóru til royndina.

Miðalúrslit fyri landið er 71,5%




*Talva 8. Støddfrøði 4. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Sum talva 8 vísir, so hevur uppgávan hilnast eftir ætlan. Allir næmingar hava klárað fyrstu partarnar serstakliga væl. Í hesum pørtunum eru grundleggjandi førleikar sum t.d. pluss og minus kannaðir.

Tó at royndin hevur gingið væl, so eru nøkur úrslit, ið fanga eygað, t.d. 13. partur (57,6%), ið er eitt lesistykki. Her skulu næmingarnir fyrihalda seg til tekst, mynd og at rokna, ein uppgáva, sum kemur undir førleikan “fleiri roknitilgongdir”, sum nevnt í innganginum. 18. partur (52,3%), sum er at rokna við negativum tølum og úrslitum og 22. partur (36,9%), sum er eitt lesistykki, har næmingarnir skulu býta, fanga eisini eygað.

## Støddfrøði 6. flokkur

Uppgávurnar í støddfrøði 6. flokkur eru samansettar av 23 pørtum. Fleiri spurningar eru knýttir at hvørjum parti. Talan er um pluss, minus, lesistykkir, at býta, hagfrøði, krossskipan, gjaldoyra o.a. Alt roknihættir, sum eru ítøkiliga nevndir í námsætlanini undir “Fakligir førleikar, 6. flokkur”.

577 næmingar vóru til royndina.

Miðalúrslit fyri landið er 65,79%




*Talva 9. Støddfrøði 6. flokkur. Landsyvirlit, miðaltal*

Talva 9 vísir, at stór sveiggj eru í miðalúrslitunum. Næmingarnir hava serliga havt avbjóðingar við 12. parti (33,5%), 22. parti (30,5%) og 23. parti (29,98%).

12. partur er spegling í eini krossskipan. Hendan uppgávan krevur, at næmingurin kennir mannagongdina í WISEflow fyri at kunna loysa uppgávuna rætt. 22. partur er mátilutfall (ein bilur), henda uppgávan krevur, at næmingurin dugir at ímynda sær, hvussu stórur bilurin í veruleikanum er, og dugir at rokna cm um til m. Næmingurin skal vita, hvat eitt lutfall er, tí annars ber ikki til at rokna. 23. partur er eitt lesistykki, har man skal býta fyri at finna úrslitið.

## Samanumtøka

Próvstovan skipar landsroyndina í samstarvi við skúlarnar kring landið. Royndin í ár gekk væl. Skúlarnir kenna nú talgildu skipanina, og í tøttum samstarvi við teir hava fyrreikingarnar og royndarhaldið gingið væl.

Úrslitini, sum her eru greinað, geva ikki innlit í heildarúrtøkuna hjá skúlunum. Úrslitini vísa, hvussu næmingar í 4. og 6. flokki í miðal hava loyst ítøkiligu uppgávurnar innan ásettu karmar og í sambandi við tað, sum uppgávurnar hava lagt upp til. Skúlarnir fáa miðalúrslit fyri landið, floksúrslit og næmingaúrslit, og hesi verða brúkt sum partur av regluligu eftirmetingini hjá einstaka næminginum og flokkinum sum heild.

Nám/Próvstovan hevur í ár valt at stytta um almennu frágreiðingina, og fer at raðfesta samskifti við skúlaleiðslur um úrslitini hjá einstøku skúlunum, og hvussu hesi kunnu brúkast sum liður í menningini av undirvísingini. Harumframt heldur førleikamenning av uppgávunevndunum fram, og endamálið er at geva øllum pørtum íblástur til arbeiðið at menna undirvísing, uppgávugerð og eftirmeting í skúlanum.